

# Ávara um russiska njósning innan olju og gass

**Jan Müller**

09.05.2014 - 12:12

Oljan.fo

Norsku myndugleikarnir ávara nú um, at kreppan í Ukraina hevur gjørt, at norska olju- og gassvinnan er vorðin meiri áhugaverd fyri ta russisku fregnartænastuna.

-Okkara olju- og gassídnaður hevur serliga stóran áhuga í Russlandi nú, sigur leiðarin hjá fregartænastuni hjá norsku løgregluni, Benedicte Bjørnland, við tíðindastovuna NTB. Hon leggur tó dent á, at tað eru ikki bara russar, men eisini onnur lond, sum hava áhuga í norska olju- og gassídnaðinum, men hon nevnir kortini ikki, hvørji hini londini eru.

-Vit eru ein týðandi olju- og gassveitari, og onnur lond vilja fegin vita, hvussu stóra orku vit hava, sigur hon.

Sambært PST-leiðaranum eru tað ikki bara tey ovastu innan politikk ella vinnu, sum fáa vitjan ella fyrispurningar frá onkrari útlendskari fregnartænastu. Tað er heldur ikki bara olju- og gassvinnan, sum hava áhuga, tí áhugi er eisini fyri ymsum tøknifyritøkum, tryggingarfeløgum, og fólk í almennu umsitingini kunnu eisini vera áhugaverd, sigur Benedicte Bjørnland og heldur fram:

-Tað er ein grundregla, at ein eigur at seta sær sjálvum spurningin, um ein hevur onkra vitan, sum kann gera skaða, um óviðkomandi fáa aftur á henni. Hevur ein tílíka vitan, skal ein taka neyðug stig, sigur PST-leiðarin. Eitt nú er neyðugt at vísa varsemi í samband við post og teldupost, og hvønn ein tosar við í telefonini.

**Hent fyrr**

Benedicte Bjørnland sigur, at útlendsk fregnartænastufólk virka ofta sum diplomatar ella tíðindafólk, men í summum førum kunnu tey útvega sær upplýsingar við at fáa atgongd til upplýsingar á teldukervinum.

PST-leiðarin heldur ikki, at fregnartænastuvirksemið er vaksið eftir kreppuna í Ukraina, men at tað er broytt. Tað útlendska virksemið er álvarssamt og skaðiligt, serliga tí at upplýsingar, sum koma á skeivar hendur, kunnu skaða norsk áhugamál illa.

-Ofta er tað so, at vit síggja ikki skaðan fyrr enn aftaná og ofta fleiri ár aftaná, sigur Benedicte Bjørnland við NTB.

Í 2008 ávaraði trygdartænastan hjá norsku løgregluni eisini um økt útlendskt fregnartænastuvirksemi. Táverandi leiðslan metti, at tann veksandi áhugin fyri Noregi komst av, at norðmenn vendu oljueygunum ímóti teimum norðaru havleiðunum.

Russiska sendistovan í Oslo vísir hesum aftur og sigur, at norðmenn síggja enn spøkilsir frá kalda krígnum.